

# Løgfrøðingur til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

## Ert tú løgfrøðingur og hevur hug at arbeiða í einum politiskum og fyrisitingarligum umhvørvi við regluverkinum innan okkara fremstu vinnugrein?

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið søkir eftir løgfrøðingi til spennandi og avbjóðandi starv at byrja skjótast gjørligt.

Sum løgfrøðingur kemur tú í høvuðsheitum at arbeiða á fiskivinnuøkinum, har uppgávurnar m.a. eru:

- At luttaka í arbeiðinum at menna og dagføra lóggávu og regluverk á sjófeingisøkinum.
- At veita løgfrøðiliga ráðgeving í ráðnum og til stovnar undir ráðnum.
- At viðgera mál saman við øðrum í ráðnum og stovnum undir ráðnum.

### Førleikakrøv

Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv og vit vænta, at tú:

- Dugir at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt, og at tú eisini dugir at samskifta og samstarva við onnur fyri at loysa mál í felag.
- Hevur góð greiningarevni, innlit í samfelagsviðurskifti og politiskt tev.
- Ert málsøkin og loysir uppgávur við góðum huga og nærlagni.
- Hevur góðar sosialar førleikar, ert fleksibul og viðvirkar til eitt gott arbeiðsumhvørvi.
- Dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum, bæði í skrift og talu.

Roknast kann við, at arbeiðstíðin stundum fellur uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

### Vit bjóða

Eitt spennandi og avbjóðandi starv við fleksiblum kørmum og fjølbroyttum arbeiðsuppgávum, sum verða loystar í tøttum samstarvi við starvsfelagar í ráðnum.

Tú verður partur av dugnaligum starvsfólkahópi, har vit raðfesta trivnað og gott arbeiðsumhvørvi.

Vit leggja dent á samstarv, vitanarskifti og at menna okkum fakliga. Tí eru góðir møguleikar fyri førleikamenning og luttøku á viðkomandi skeiðum.

### Løn og setanartreytir

Starvið er fulltíðarstarv og skal setast skjótast gjørligt ella eftir avtalu.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF. Setanarøkið fevnir um Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

### Um Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið er eitt av níggju stjórnarráðum í landsfyrisitingini, ið veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika.

Her starvast 17 starvsfólk, sum umsita fiskivinnumál, fiskiveiðieftirlit, fiskirannsóknir og – gransking, inntøkutrygd fiskimanna, hvalamál, bjarging, trygd, veðurtænastu, busskoyring, farmakoyring, ferjulegur, ferjur, ferðslumál, landshavnir, landsvegir, tyrlupallar og ráðgeva viðvíkjandi flogvøllum.

### Umsóknarfreist

Um starvið hevur tín áhuga, send okkum umsókn við lívsrensli og avriti av prógvum til **starv@fisk.fo í seinasta lagi 1. januar 2025.**

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Betzy Ludvig, **tlf. 267703** ella t-post **betzy.ludvig@fisk.fo**

Vit gleða okkum at frætta frá tær.

**FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 | Postrúm 347 | FO-110 Tórshavn | Tlf: +298 35 30 30 | fisk@fisk.fo